


### H. C. Müller:

# Sýslumaður og so nógv annað

**Vit høvdu fyri kortum søguna um Søren Müller, kendur reiðari í Havn. Í veruleikanun kann í Gamla Kirkjugarði finnast ein stórur partur av okkara søgu í »Müllerdeildini« í kirkjugarðinum. Vit hava longu havt fleiri frásagnir frá ættini sum Jens Olsen og Grønlands Johan, sum báðir vóru giftir inn í Müllerættina. Hesa ferð fara vit til tann fyrsta sera væl kenda Müller, nevniliga Hans Christoffer Müller, oldurabbi blaðstjóran á Sosialinum. Maðurin verður best lýstur við minningarorðini, sum Føringatíðindini hevði um hann 6. januar 1898. Rasmus Effersøe var blaðstjóri tá. Minningarorðini verða endurgivin, sum tey vóru skrivað við teirri stavseting, sum varð nýtt tá**


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Firsta jólamorgun, tá íð dagur sást, doyði Streymoyarsýslumaður Hans Christopher Müller, gott og væl 79 ára gamal. Vit eru vanir til her í blaðnum, kvørja ferð ein meir enn almindiliga kendur maður er deyður, at lata nøkur orð fadla um, kvat hann hevur verið, og kvat hann hevur virkað, men at skriva eina nøkulunda tømandi grein um tann mannin, sum er nevndur oman firi hendan artikul, er ikki kvønsmannsføri, tí hansara langa liv er so sjaldsamt og inniheldur eina slíka rúgvu av virkigreinum, sum fá, ja einki annað í Førjasøguni.

H. C. Müller var føddur 2. September 1818 og var sonur sýslumannin Rasmus Müller í Havn og seinri konu hansara Sigge Joensdatter úr Nólsoy. Tó at tað í teirri tíðini ikki var lætt kjá einum Føringi at samla sær kunnskap, bilaði ikki kjá sýslumanninum. Við sínum frálíku læruevnum og sínum læruhuga søkti hann sjálvur sær tann kunnskap, sum nú nógvur peningur má gjaldast firi. Og tað er ikki bara eiti, tá íð mann ímidlum cr sagt um sýslumann Múller, at um hann onga eksamen hevði, so kundi hann andøva javnsíðis við lærdar menn í ødlum lutum.

**Sýslumaður 20 ára gamal**

Í 1839, 20 ára gamal, bleiv hann settur (konstitueraður) síslumaður kjá pápanum, og í 1843, 25 ára gamal, varð hann útnevndur til sýslumann í Streymoy og bleiv tað til sín deyð. 1852 varð hann valdur til løgtingsmann og tað hevur hann verið í 28 ár, skiftandi firi Norðstreymoy og Suðurstreymoy. I ríkisráðnum, landstinginum og fólkatinginum, hevur hann siti firi Førjar í 30 ár. Í 1869 varð hann útnevndur til postekspeditør í Flavn, tað var hann eisini inntil hann doyði. Í mong ár var hann agent firi tað danska guvuskipsfelagið, sum heldur skip til at flita post til og frá Føroyum og Íslandi. Annars hevur hann verið konstitueraður sorenskrivari og fúti; limur av ovarsta skúlastíri okkara (skúladirektiónini) og direktør firi Førja sparukassa.

**Granskari innan fugl og grind**

Um hansara lív sum politikkari vilja vit bara siga, at hann var kendur sum ein trúgvur høgrumaður, annars lata vit tølini tala. Firi uttan virðuliga at útfidla pláss sítt í ødlum teimum frammanundan nevndu virkigreinum, hevur Müller granskað imsar greinir av natúrlívinum, sum eingin annar Føringur. Hansara fugla- og eggsamlingar bera prógv firi tað, um einkið annað var, men tað er nógv annað. Hann hevur skrivað nógv um hetta bæði i eingilskum og donskum, so hann er kendur víða sum natúrgranskari. Hansara »fuglabók« er av útlendskum natúrgranskarum nógv mett, og í fleiri »natúrvidenskapiligum« skriftum er hetta verkið tiltikið sum kelduskrift. Bæði zoologisk Have og zoologisk Museum í Keypmannahavn hevur frá honum fingið nógv verdar økingar, og teir upplísningar, hann hevur givið Danmarks fiskaríforeining, mest frá Førjum, hava nógv at tíða; í hesu foreining varð hann firi fáum árum síðani upptikin sum »overordentligt Medlem«.

Hann hevur eisini skrivað eina bók um grindirnar í Førjum; hon er útsett uppá Eingilsk. Firi hesa bókina fekk hann medalju við eina framsíning í Edinburgh í 1882 og í sama viðfangi eina aðra firi fiskireiðskap. Í Berlin var hann við eina fiskiskapsframsíning. Har fekk hann eisini eina medalju firi nakað, hann læt framsína. I 1874 bleiv hann Dannebrogsmaður og í 1890 riddari av Dannebrog.

Tann 1. September 1893 varð hansara 50 árs heiðursveitsla sum sýslumaður hildin, og fólk frá imsum plássum í Streymoy var komið til Havnar at halda dagin. I sama viðfangi varð send honum ein »adressa« frá fleiri hundrað monnunum í Streymoy við tøkk firi tey 50 árini, hann hevði verið sýslumaður.

**Eisini væl kendur í útlondum**

Væl var Müller kendur í Førjum. Men hann var eisini kendur í útlondinum. Á sínum ferðum uttanlands kom hann sjálvsagt saman við nógvar útlendingar, og hann stóð í vinarlag við nógvar góðar menn, eisini uttan firi Danmark. Sum dømi uppá hetta skal nevnast, at ein Eingilskmaður við listfari(skipi) sínum tværreisur hevur komið til Havnar firi at vitja sýslumannin. Tó at hann soleiðis varð ærdur bæði av kongi og fólki, bleiv hann altíð hin sami tídligi maðurin, sum ikki síntist at var til sins at kenna hugmóð uttan av navni. Eingin kundi merkja á honum, at hann í ein mannsaldur hevði ferðast midlum hægstu menn í kongadøminum; hann tosaði líka blídliga við tað armasta neyðardír, sum við sínar líkar. Mangur fátækur maður ber honum gott, og mangur vælstidlaður maður er honum tøkk skildigur, tí hann stiðjaði fegin ein, íð stílaði framettir. Teir eru heldir ikki fáir, sum hava notið gott av Müllarsa kunnskapum og sum hann hevur lært sjálvur.

Hansara kennskapur til føroysk viðurskiftir var frálíkur, og fór ein til hansara firi at spirja um eitt edla annað, kundi spirjarin vera vissur í, at hann kom til tann rætta, og ein kundi líta á teir upplísningar, sýslumaðurin gav. Í sínum síslu verður hann seint gloymdur.

**Óførur grindamaður**

Midlum annað kann hann ikki nóg mikið rósast sum grindamaður. Í ungum árum fór hann í grind kvar sum helst, og sum síslumaður ferðaðist hann í grind inntil firi fáum árum síðani, tá íð sonur hansara varð konstitueraður firi hann. Fáur kundi sum hin gamli at halda skil á í grindadrápi. Grindamenninir aktaðu hann væl, tí teir visti av royndum, at tað, íð hin gamli segði skuldi gerast, tað var best firi adlar partar. Nú er hann farin og verður saknaður av mongum manni. Tá íð hann fadl frá kom eitt lið á í Førjum, sum seint bøtist attur, i alt fadl er tað sjaldsamt, at slíkar gávur, slíkur arbeiðshugur, slíkur dugnaskapur og trúskapur finnast í einum manni. Tey, sum kendi hann rætt, mátti halda av honum, og hansara vinir so væl sum hansara óvinir mátti meta hann høgt; eingin kundi annað. Hann var ein sannur Føringur og góður danskur statsborgari, eitt príði firi okkara lítla land, og vit kunnu ivaleyst siga, at neyvan hava so nógvir góðir menn hugsa um Førjar uppá ein gang, sum tá íð Müllers deyð frættist til útlondini. Friður kvíli ivir minni hanns.

H. C. Müller giftist 2. desember 1852 við Maren Christine f. Olsen, dóttir skómakarin Søren Olsen í Havn og Christine Marie Hentze, dóttir próvst Hentze í Sandoy. Tey eiga 7 bødn, tvey búsett í Førjum, 5 í útlondum.

**Fuglabókin**

Hetta vóru so minningarorðini, sum geva eina góða lýsing av manninum. Her skal skoytast uppí, at hansara børn skaraðu eisini framúr. Søren var eitt teirra. Tveir aðrir synir, Rasmus og Poul, vóru kolonistýrarar í Grønlandi seinast í 1800-talinum. Vit eru við at útvega áhugavert tilfar, sum fer at lýsa teir báðar, og tað fer eisini at koma í Sosialin seinni.

Her skal verða komið inn á skrivligu avrikini hjá H. C. Müller. Sum tað verður nevnt í minningarorðunum var fuglur millum hansara stóru áhugamál.

Hann hevur eisini skrivað eina bók um fugl, sum varð prentað í 1863. Hetta er ein ritgerð, sum er 78 síður. Í henni verður greitt frá 124 ymiskum fuglasløgum í Føroyum.

Tað verður ikki høvi til her at koma inn á hesa ritgerð. Hon kann lænast á Landsbókasavninum. Bert skal her verða endurgivið fororðið til ritgerðina:

“De Bemærkninger til den færøiske Fuglafauna,



*SYSSELMAND*
*HANS CHRISTOPHER*
*MÜLLER*
*R. AF D. OG DBMD*
*F. 2. SEPTEMBER 1816*
*D. 25. DECEMBER 1897*

*MAREN CHRISTINE*
*MÜLLER*
*FØDT OLSEN*
*F. 14. AUGUST 1829*
*15. MAI 1898*



*H.C. Müller og konan Maren Christine*